# Fagnaðardagur á Selatrað



# 2. hvítusunnudag

## kl. 13⁰⁰ - 17⁰⁰

**Unnið tykkum ein góðan dag á Skótadeplinum á Selatrað - við allari familjuni.**

2. hvítusunnudag verður møguleiki hjá øllum familjum og øðrum áhugaðum at koma á Skótadepilin, tí henda dagin fara skótabólkarnir kring landið at skipa fyri nógvum ymiskum tiltøkum.

**Hetta vikuskiftið er eisini LPK, sum er landspatrúljukappingin hjá KFUM-skótunum, so tit fáa eisini møguleikan av vera hjástødd, tá ið patrúljan, sum vinnur, verður heiðrað.**

Endamál okkara, við fagnaðardegnum á Selatrað, er at skipa fyri einum familjudegi og at fáa til vega pening til liðuggerð av Skótadeplinum.

***Nógv tiltøk á skránni. Byrjað verður kl. 13⁰⁰***

- *fiskibrunnur*
- *rør-skreiðibreyt*
- *matsøla og café*
- *gandatjald*
- *primitiv matgerð*
- *skjótibreyt*
- *svampakast*
- *pílakast*
- *poppcorn á bálið*
- *klintring*
- *tombola*
- *lutaseðil við nógvum vinningum*

**Ferðasamband millum Hósvík og Selatrað**

| Úr Hósvík: | Av Selatrað: |
|---|---|
| kl. 13.00 | kl. 14.30 |
| kl. 14.00 | kl. 15.30 |
| kl. 15.00 | kl. 16.30 |
| kl. 16.00 | kl. 17.30 |



*Heitt verður á tey, sum koma til Selatraðar við bili, um at ansa eftir seyði millum Kolbanargjógv og Selatrað.*

**Vælkomin at vitja á Skótadeplinum á Selatrað 2. hvítusunnudag.**

**KFUM-SKÓTARNIR Í FØROYUM**

*- ein virkin barna- og ungdómsfelagsskapur*

## Svimjivenjari søkist

Fuglafjarðar Svimjifelag søkir eftir venjara til svimjiárið 2000-2001.

**Vit kundu hugsa okkum:**
- at tú hevur verið á venjaraskeið ella
- hevur royndir innan svimjing.

**Um hetta hevur tín áhuga:**
Fæst meir at vita, við at venda sær til felagið á tlf. 444187.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **15. juni 2000.**

**Fuglafjarðar Svimjifelag**
Norðuri í Bø 3
530 Fuglafjørður

## Diesel bilur til sølu



Audi A3 - TDI - árg. 97, koyrt 70.000 km, í sera góðum standi, til sølu. Hevur sportsfelgur og CD-spælara. Kostnaður 163.000 kr.

**Tlf. 311960** ella **213061**

## Frá Havnar Handverkarafelag

***Broytt skrivstovutíð***

Skrivstovan er nú opin soleiðis:
**mánadag til og við fríggjadag**
**kl. 09.00–12.00** og
**hósdag seinnapart frá kl. 15.00–18.00**

Telefon 311548 · Telefax 319548
(telefonsvarari tekur ímóti boðum, tá eingin er á skrivstovuni)

## Tekniski Skúlin í Tórshavn søkir lærarar

**2 tímalærarar til el-deildina**
Størvini eru tímalærarastørv, við møguleika fyri føstum starvi seinni.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum elektrikari, hava prógv sum el-installatørur og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið. Umsøkjarar við hægri útbúgving hava fyrimun. Eisini er áhugi fyri stødd-, alis- og evnafrøði, og nýtslu av EDV ein fyrimunur.

**Løn**:
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Størvni skulu setast skjótast tilber og í seinasta lagi 1. august 2000.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 13. juni 2000.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlan, tlf. 31 19 57.

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**

## Viðareiðis skúli

Søkt verður eftir 2 lærarum til Viðareiðis skúla at undirvísa fulla tíð komandi skúlaár.

Annað starvið er tíðaravmarkað frá 1. august til 4. desember 2000. Hitt starvið er fyri alt skúlaárið 2000/2001.

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlaleiðaran á tlf. 451180 ella 451175.

Umsóknir saman við ljósriti av próvskjali verða at senda skúlanevndini í seinasta lagi fríggjadagin 23. juni 2000 og skulu sendast til:

**Viðareiðis skúlanevnd**
v/ Mirjam Heinesen
FO 750 Viðareiði



# HYGG & HOYR

Fríggjadagur 9. juni

# Nú byrjar summarið í útvarpinum

*Komandi týsdag fer útvarpið undir summarskrá sína, og fyri lurtararnar merkir hetta bæði broytt innihald í sendingunum og broytt senditíð*



Týsdagin eftir hvítusunnu byrjar summarið hjá útvarpinum. Nú summarskráin tekur við, fara nakrar av teimum førstu vetrarsendingunum at hvíla, og í summar fer útvarpið at gevast við tíðindum klokkan 22 á kvøldi.

**Summarsendingin aftur**
Eins og í vetur verður byrjað kl. 7 á morgni við tíðindum og morgunlestri, og eftir tíðindini kl. 7.30 byrjar morgunsendingin. Nú summarið í útvarpinum byrjar, verður seinnapartssendingin við samrøðum, frásagnum, spurnarkappingum, tónleiki og øðrum tikin upp aftur.

Í ár verður sendingin at hoyra týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15 til 17 og fríggjadag frá kl. 16 til 18.

**Eyka møguleika**
Tey, sum ikka hava høvi at lurta eftir morgunsendingini ella seinnapartssendingini, fáa aftur ein møguleika um kvøldið. Eftir tíðindini kl. 20 eitur sendingin Kvøldarstund, og í henni verður nakað av tilfarinum frá morgunsendingini og seinnapartssendingini endursent.

**Samstarvið við Pegasus**
Sendiskráin sunnukvøld verður øðrvísi í summar. Higartil hevur útvarpið sløkt kl. 19 sunnukvøld, men í summar er ætlanin at senda til 23.

Utvarpið gjørdi í farnu viku avtalu við Studio Pegasus í Klaksvík, um at tey skulu framleiða fýra tímar av útvarpstilfari fyri útvarpið hvørt sunnukvøld. Sendingin, sum hevur fingið heitið »Sunnukvøld í Klaksvík«, verður ein sending við blandaðum tilfari.

Summarskráin hjá útvarpinum verður í gildi til síðst í august mánaði.

## ÚTsjón - um loftmiðlar okkara

# Lokalredaktiónir góður íblástur



Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, skrivar

Í útvarpsins barndómi høvdu teir tíðindamenn úti um landið at útvega lokalkent senditilfar. Eitt nú høvdu teir í Klaksvík hin kenda John Reid Bjartalíð (»Jese pape«), sum eina drúgva tíð veitti útvarpinum manga søguna umframt okkurt óætlað skemtiligt við. Veit ikki reiðiliga, hví lokalu redaktiónirnar duttu niðurfyri, men nú fann so fyrst Rás 2 uppá at brúka studio Pegasus í Klaksvík, og tá tað forlovilsið ikki helt, so loftaði útvarpið hegnisliga hesi higartil so frálíku lokalredaktión í Klaksvík.

Eg lurtaði væl eftir studio Pegasus alt farna sunnukvøld (sjónvarpið nyttaði onki) og vóru øll teirra innsløg við barnasending, ítrótti, gestapráti, ungdómssending og skemti áhugaverd og væl úr hondum greidd. Vónandi verður hetta ikki bert eitt upplop, men varandi støði framyvir.

Annars vóru í sambandi við Norðoyastevnuna – eg haldi á Rás 2 – fleiri plattar vittigheitir við atliti til skotorrustuna í Klaksvík herfyri. Tann sorgarleikin við ongum hetjum, men bara taparum átti ongin at troysta sær at sligið platt uppá og latið bara Oyggjatíðindi saman við Dagblaðnum eiga tað burturav.

Sunnudagin hevði Sonne Smith á Rás 2 eitt forvitnisligt viðtal við varaløgmann, har journalistikkur kom til sín rætt, tá hann er bestur.

Annars havi eg farnu vikuna ikki verið so raskur at lurta og hyggja at, haldi summarleti (agurkutíðina) vera komið á fjølmiðlarnar, ella er tað bara eg sjálvur, sum heldur vil vera uttandura enn inni hesa ársins ljósastu tíð.

Í aðrar mátar koma hottastu gerandistíðindini framvegis frá teimum skiftandi, heimligu, gudligu hermótunum, og ímeðan nærkast so sjálv finalan á 1000-ára haldinum á Hvítusunnu við bispahópvitjan, kongaligum roykilsi við meira.

Sum vanligt rættuliga óvirkið kirkjufólk skammist eg um hetta vanærisliga og púra óneyðuga stríð, men ætli mær kortini framyvir saman við øðrum stórsyndarum at njóta onkra stilla løtu innan kirkjugátt.

Og samstundis iðri eg meg nú um, at eg í einum av mínum undanfarnu fjølmiðlaummælum fór so illa við baptistunum at skuldseta teir fyri primadonnunykkur at takka nei til felagsluttøku í 1000-ára haldinum. Eg meinti tað ikki so illa og helt bert, at teir áttu sín sjálvsagda leiklut sum størsta fríkirkjumeinigheit og við greitt virknasta sálmaskaldi higartil í Føroyum. Men síðani havi eg millum annað sæð, at Siloa-kórið saman við Fríðrikson presti hava minst hetta sálmaskald í einum av teimum fyriskipaðu tiltøkunum í sambandi við 1000-ára haldið.

At finna úthurðina, meðan væl er, man eisini vera neyðugt hjá einum loftmiðlaummælara, og nú eg havi hingið í hetta seinasta drúgva árið, havi eg valt at gevast og fari at nýta høvið til at takka teimum, sum hava tímað at lisið krutl míni.

Umbering til tey, sum hava kent seg særd, og at enda ynski til okkum øll somul um eitt gott summar, men fyri fyrst góða Hvítusunnu og í tí sambandi vónandi eitt hóast alt gott felags 1000-ára hátíðarhald.

ÚTsjón — Marna Jakobsen, Steintór Rasmussen, Annika Joensen og Eyðun Joensen skiftast um at skriva ÚTSJÓN